Heimarøktin og Serforsorgin
Serstovnadeildin
Sambýlið Eirargarður 16B suður
Eirargarður 16 · FO-100 Tórshavn

# Sernámsfrøðilig verkætlan

Er tú pedagog, sjúkrarøktarfrøðingur, sjúkrarøktarástøðingur, heilsuástøðingur ella hevur samsvarandi royndir, er tað kanska tær vit leita eftir til eina verkætlan á Eirargarði 16B Suður.

Eirargarður 16B Suður er ein sernámsfrøðilig verkætlan undir Heimarøktini og Serforsorgini.

Talan er um størv í niðursettari tíð og eru tey tíðaravmarkaði í 3 mánaðir. Í arbeiðsætlanini eru bæði morgun-, dag-, kvøld- og náttarvaktir, umframt vikuskiftisvaktir.

Av persónligum eginleikum vænta vit at tú er sjálvstøðug/ur, samstarvssinnað/ur, rólig/ur, kropsliga og sálarliga væl fyri, fleksibul, kreativ/ur, dámar væl avbjóðingar og er ágrýtin.

**Verkætlanin**
Verkætlanin snýr seg um at stuðla og menna einum búfólki í gerandisdegnum við t.d. sosialari samveru, svimjing, ganga túrar, fitness, fara til tiltøk so sum konsertir, handaligum ítrivum, matgerð og húsligum arbeiði.

**Løn og setanartreytir**
Løn er sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina við fyribilssetan á verkætlanini Eirargarður 16B Suður.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og lívsgongdarlýsing skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. mai 2005.

Størvini eru til setan skjótast til ber.

Nærri upplýsingar um starvið fært tú við at seta teg í samband við Onnu Johannesen, leiðara, á telefon 215540.

Umsóknir skulu stílast til

**Sambýlið Eirargarður 16B Suður**
Eirargarður 16B Suður
100 Tórshavn

**Móttakari:** Anna Johannesen, leiðari

**Mentamálaráðið**

# Skrivari/málsviðgeri

**Starvið**
3/4-tíðar starv sum skrivari/málsviðgeri er leyst at søkja í Mentamálaráðnum.

Talan er um áhugavert og fjølbroytt starv í ***Yrkisdeplinum*** við møguleikum fyri fakligari og persónligari menning við skiftandi uppgávum.

**Høvuðsuppgávurnar**
- at vera skrivari/málsviðgeri umframt at arbeiða við øllum vanligum fyrisitingarligum uppgávum.
- at hava skrivligt og munnligt samskifti við lærupláss, lærlingar, yrkisskúlar, yrkisnevndir og onnur innan arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarøkið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjari hevur:
- HH-útbúgving og royndir í skrivstovuyrkinum ella aðra javnsetta útbúgving og royndir.
- góðan teldukunnleika og kunnleika til mál, serliga føroyskt.
- góð samstarvsevni og førleika at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt stjórnarráðið og tess stovnar.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Yrkisdepilin**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Ella sum teldupostur til:
peturoh@yrkisdepilin.fo

Umsóknir skulu vera Yrkisdeplinum í hendi í seinasta lagi 25. mai 2005, kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

*Upplýsingar um virksemið hjá Yrkisdeplinum eru at finna á heimasíðuni: www.yrkisdepilin.fo*

*Ynskjast fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðara, á tlf. 555066.*

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

***Yrkisdepilin,** ið er ein sjálvstøðug fyrisiting í Mentamálaráðnum, fyrisitur arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingar-mál, herundir at verða fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum. Yrkisdepilin fyrisitur eisini ávís viðkomandi málsøki fyri Mentamálaráðið, herundir at avgreiða ferða- og lønarendurgjald til lærupláss o.l.*

ShapeWorks™
Independent Distributor

**Við hjálp frá shapeworks ber til at regulera tey óynsktu kiloini**

- einfalt og nemt
- orku og yvirskot
- úrslit



Tú fært alla tað vegleiðing og stuðul tær tørvar.

Um hetta ljóðar áhugavert, so ring fyri at hoyra nærri.

**Daniela & Willi Olsen**
TEL 422367 · WWW.NYGGJANFIGUR.NU
*sjálvstøðugir Herbalife forhandlarar*

Sosialurin 341800

Lesið Sosialin -so eru tit við!

**Størv**

# Frítíðaravloysarar



Við hesum verður søkt eftir frítíðaravloysarum, sum lastbilførarar/farmastøðsfólk til Farmastøðirnar kring landið, summarið 2005.

Freistin at søkja størvini er tann 23. mai 2005.
Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 813,** Sp/f Leivur Nattestad, 370 Miðvágur.
**Viðtøkur broyttar:** 06.04.2005
**Partapeningur:** Hækking við kr. 201.698,00 til kr. 381.698,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 201.698,00 við grunshækking.
**Kapitalur:** Viðtikið 06.04.2005 at lækka partapeningin við kr. 301.698,00 til kr. 80.000,00 til kurs 530, til útgjaldingar eftir at proklama er runnið.

Skráseting Føroya tann 03. mai 2005

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 1209,** P/F Herman Winther, 240 Skopun.
**Partapeningur:** Viðtikið tann 18.03.2005 at lækka partapeningin við kr. 499.307,00 til kr. 186.000,00 til kurs 77, til útgjaldingar eftir at proklama er runnið

Skráseting Føroya tann 03. mai 2005

Kristin Balle

veitst tú ikki tað? Sosialurin